Pedagogfelagið:

# Hjálp sum munar á breddan

**Pengar eru ikki nokk, um vit skulu hjálpa børnum við trupulleikum. Minst líka umráðandi er tað, at hjartað er við, so hjálpin veruliga ger mun. Hvussu vit best skipa hesa hjálpina, er evni á limafundi hjá Føroya Pedagogfelag hóskvøldið**

LIMAFUNDUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Hetta fram til summarfrítíðina fer Føroya Pedagogfelag at varpa ljós á ymisk faklig evni á limafundum kring landi. Fyrsti fundurin verður nú hóskvøldi kl 19 á verkstaðnum Vón á Argjum.

### Heilhjartað hjálp

Á hesum fyrsta fundinum verður tað Finnur Helmsdal, sosialráðgevi, sum fer at tosa um, hvussu vit best skipa hjálpina til børn við trupulleikum á ein hátt, so hon bæði er fakliga



*Við komandi limafundunum kring landið fer Pedagogfelagið at markera seg sum eitt meir framsøkið felag, sigur formaðurin Jarvin F. Hansen*

kompetent og heilhjartað, umframt at øll familjan verður tikin við. Finnur skal á fundi í norðurlendska fakliga felagsskapinum hjá sosialráðgevum og pedagogum í apríl til Noregs at halda fyrilestur um hetta evni, við serligum atliti til, at skalt tú geva hjálp, sum munar, mást tú hava bæði hjartað og heilan við. Bert at lata nóg mikið av almennum pengum er ikki nóg mikið.

Jarvin F. Hansen, formaður í pedagogfelganum vísir á, at sum er, kundi henda hjálpin til børn verið munandi betri skipað, so størri samanhangur var millum tíðina áðrenn og aftaná at barnið er byrjað í skúlanum. Sum eitt fyrsta stig á leiðini eru lærarar og pedagogar byrjaðir at tosa um, hvussu hetta samstarvið kann leggjast til rættis. Jarvin vísir á, at tá tað eitt nú snýr seg um sosialar trupulleikar hjá einum barni, eru ofta fleiri ymiskir fakbólkar við í arbeiðinum. Tað er tó ikki nøkur loyna, at teir ymsu fakpersónarnar ofta kenna seg rættiliga einsamallan í arbeiðinum, tí tvørfakliga samstarvið er so avmarkað.

–Men hetta er trupulleikar, sum væl kunnu loysast, sigur Jarvin, sum fegnast um nýggju stigini, sum verða tikin til størri samstarv sum heild á økinum

### Meir sjónlig og framsøkið

Komandi limafundirnir kring landið hjá Føroya Pedagogfelag eru millum annað ein liður í at gera felagið meir sjónligt, ikki minst á ein meir framsøknan hátt. Sjálvur heldur Jarvin, at í so nógv orka ofta fer til at sløkkja eldar, har nógv kundi verið vunnið, um vit vóru betri fyrireikaði uppá støðuna. Við hesum í huga fer felagið nú undir at taka ymisk evni upp, sum á onkran hátt røra seg á yrkisøkinum hjá felagnum.

Á øðrum fundum fer Firouz Gaini at tosa um ungdómsmentan og Anna Dam, lógfrøðingur, at tosa um barnaverndarlógina. Umframt hesar verður eisini skipað fyri fundi í sambandi við at Mogens Seider vitjar felagið. Mogens er útbúgvin pedagogur, og hevur verið næstformaður í Socialpædagogernes Landsforbund í 8 ár. Maud Wang Hansen, pedagogur fer seinni í ár at leggja úrslitið fram av einari kanning um eldrapolitik.

Hetta eru bert nøkur av evnunum, sum Føroya Pedagogfelag hevur valt at umrøða, og vónar felagið at limirnir fara at taka væl undir við hesum limafundunum.

Næsti fundur verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, har kjakcafé er á skránni.

# Ein góð skúlabyrjan hjá menningartarnaðum børnum

**Mikukvøldið verður varpað ljós á evnið: ein góð skúlabyrjan hjá menningartarnaðum børnum. Javni stendur fyri tiltakinum, sum verður á trimum støðum í senn**

MENNINGARTARNAÐ BØRN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Á hvørjum ári skipar Javni fyri økisfundum, har ljós verður varpað á eitt ávíst evnið, sum hevur við menningartarnað fólk at gera. Í ár er yvirskriftin: Ein góð skúlabyrjan hjá menningartarnaðum børnum.

Annlis Bjarkhamar, sum er dagligur leiðari hjá Javna, sigur við Sosialin, at endamálið við tiltakinum er, at geva foreldrum, lærarum, pedagogum og øðrum nøkur amboð til at fyrireika skúlabyrjanina hjá menningartarnaðum børnum.

Annlis Bjarkhamar sigur, at tað er ómetaliga spennandi at byrja í 1. flokki, bæði hjá børnum og foreldrum. Tað er byrjanin til eitt nýtt tíðarskeið, og tað er við vón um menning og trivnað, at foreldur lata børn síni fara um skúlagáttina á fyrsta sinni.

– Hesar vónir hava foreldur at menningartarnaðum børnum eisini, tó at tey eru vitandi um, at teirra barn, í størri mun enn onnur børn, hevur tørv á eini innskúling, sum tekur atlit til, at barnið er menningartarnað, sigur Annlis, og leggur afturat, at um okkara fólkaskúli skal rúma øllum børnum, er neyðugt, at hann tekur atlit til, at børn eru ymiskt og hava ymiskan tørv.

– Skal menningartarnaða barnið fáa eina góða skúlabyrjan, er neyðugt, at hon er væl fyrireikað og fer fram í góðari tíð, longu áðrenn fyrsta skúladag, greiðir Annlis Bjarkhamar frá. Og hon sigur víðari, at innskúlingin eisini skal fyrireikast í einum tøttum samstarvi við øll tey, sum eru



*Annlis Bjarkhamar, dagligur leiðari hjá Javna*

partur av gerandisdegnum hjá barninum.

Á økisfundunum fara lærarar, pedagogar, foreldur og onnur við servitan innan økið at geva teirra boð uppá, hvat skal til fyri at skúlabyrjanin verður so góð, sum til ber hjá menningartarnaða barninum.

### Á trimum støðum í senn

Annlis sigur seg vóna, at nógv fólk taka av tilboðnum og møta á fundunum, sum verða mikukvøldið kl. 19.30, á hesum støðum: Í Suðuroy á Hotel Bakkanum í Vági, fyri Eysturoynna og Norðoyggjar í Studentaskúlanum á Kambsdali og fyri Streymoy, Sandoy og Vágarnar í Miðlahúsinum í Havn.

Tey, sum koma at hava upplegg í Vágu verða: Rannveig Hovgaard, lærari, Unn Michelsen, leiðari í barnagarðinum Eikilund, Emma Lisberg, pedagogur og Jórun Midjord, foreldur. Í Studentaskúlanum í Kambsdali verða tað hesi, sum fara at hava upplegg: Lena Jacobesen, serlærari, Jórun Niclasen, pedagogur, Katrin Olsen, foreldur og Katrin Haraldsen, foreldur. Í Miðlahúsinum fara hesi at hava upplegg: Rógvi Thomsen, cand.pæd, Gudrun W. Rasmussen, leiðari á dagstovni, Birita Djurhuus, lærari og Fríðbjørg Hammer, foreldur.

Barnabøkur frá Bókadeildini:

## Detektivar og fótbóltshetjur

**Herfyri gav Bókadeildin út tvær forvitnisligar bøkur til størri børn – eina um detektivarnar Lassa og Maiu og eina um fótbóltsgalnu bjørnina Bjarna. Eisini hava tey smæstu fingið sín egnu snøggu bók um kroppin**




NÝGGJAR BØKUR




**Fótbóltshetjan Bjarni**

*Fótbóltsgalin* er ein stuttlig og øðrvísi myndabók. Sum so mong onnur er bjørnin Bjarni eisini fótbóltsgalin. Hægsta ynskið er at sleppa at spæla við á liðnum hjá Ludda og hansara Tikararum. Teir lata hann sleppa at venja við teimum, men tað gongst onki serligt hjá Bjarna, so hann má sita á bonkinum sum eykamaður, tá Tikararnir spæla dyst móti Leyvunum. Men so ein dagin fær Bjarni knappliga sín heilt stóra møguleika. Uttan iva ein bók, ið nógv kenna seg aftur í. Bókin er væl egnað til tey 4-7 ára gomlu. Colin McNaughton skrivaði, og Eli Hentze týddi.

**Enn ein krimigáta fyri Lassa og Maiu**

*Gimsteinagátan* er fyrsta bókin í eini røð av níggju bókum við teimum báðum Lassa og Maiu sum høvuðspersónum. Onkur hevur stolið gimsteinar frá gullsmiðinum Muhammed Karat. Tað er mangt, sum peikar á, at eitt av starvsfólkunum í handlinum hevur framt brotsgerðina. Løgreglan stendur tó á berum, so nú má detektivstovan hjá Lassa og Maiu taka sær av málinum. Sum tveir rættir njósnarar lata Maia og Lasse sum tey eru í starvi hjá í gimsteinahandlinum hjá Muhammed, og har gongur mangt løgið fyri seg …

Tað er Martin Widmark, sum hevur skrivað, og Sámal Kristian Jacobsen hevur týtt. Hesar spennandi bøkurnar eru væl egnaðar til tey 8-10 ára gomlu. Tann næsta í røðini kemur út í juni.

*Gimsteinagátan* er 76 bls., innbundin og Helena Willis hevur myndprýtt.




**Kroppur og sansir**

*Mín fyrsta bók um kroppin* er bók við fittum myndum, sum umframt at seta navn á líkamslutir, eisini er um sansirnar og lærir barnið at seta orð á rørslur. *Mín fyrsta bók um kroppin* er væl egnað til tey smæstu, hon er 36 síður í litum og prentað á haldgott papp.

**ave**

Kl. Bókasavn:

## Tónleikacafé fyri ung

Týskvøldið 21. mars kl. 19.30 verður skipað fyri tónleikacafé fyri ung yvir 14 ár á Klaksvíkar Bókasavni. Tað verða ungfólk, sum fara at framføra, og tónleikurin verður blandaður alt frá rocktónleiki til klassiskan tónleik. Tey, ið fara at framføra, eru frá Klaksvíkar Tónlistaskúla og Klaksvíkar Hornorkestri. Eisini verður



høvi at hoyra ein ungan rockbólk og ein sangbólk.

Á caféini verður eisini okkurt leskiligt at fáa.

**ave**